# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Stórtapini níva ikki einans hjá viðhaldsfólkunum, men eisini hjá okkum í hópinum. Tí hava verður tað mín áheitan til viðhaldsfólkini, um at stuðla liðnum, tá tað fer á vøllin leygardagin*

*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari*

# Jákup Mikkelsen liðformaður



*Hetta verður eitt sindur øðrvísi nú enn vanligt, og kann tað eisini vera við at geva nakað eyka til mín sjálvs, nú eg skal hugsa meiri um liðið*

Mynd: Jens Kristian Hansen

**Málmansveteranurin er maðurin sum yvirtekur liðskiparabindið nú greitt er, at Óli Johannesen ikki verður við landsdystirnar móti Litava og Fraklandi**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað tað verður Jákup Mikkelsen sum skal stýra liðnum á vøllinum til landsdystirnar leygardagin og mikudagin. Tað kundi Jógvan Martin Olsen fortelja Sosialinum í morgun, eftir at landsliðið hevði vant.

– Jákup Mikkelsen hevur verið við so longi og hevur nógvar royndir, so tí var tað eitt natúrligt val, sigur landsliðsvenjarin um valið.

Jákup Mikkelsen sjálvur var sjálvandi glaður um, at hann var valdur at stýra liðnum á vøllinum, men var sum vanligt púra róligur, tá vit spurdu hann, hvat hann helt um valið.

– Óli hevur gjørt tað væl í so nógv ár, og eg síggi tað sum eina uppgávu, at eg nú skal lyfta liðið, sigur nýggi liðformaðurin.

– Hetta verður eisini eitt sindur øðrvísi nú enn vanligt, og kann tað eisini vera við at geva nakað eyka til mín sjálvs, nú eg skal hugsa meiri um liðið, segði Jákup Mikkelsen eftir venjingina, sum endaði stutt fyri døgurða.

# Mugu vera raskari í verjupartinum

**Jógvan Martin Olsen sigur, at tað er givið, at teir nú mugu vera raskari í verjupartinum undanfarnu dystirnar, men at teir sjálvsagt ikki fara at stilla 10 mans rundan um brotsteigin at verja**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Vit hava eina venjing aftrat í morgin og tá skulu tveir leikarar sáldast frá, so eg fái ikki sagt nakað um hvussu liðið fer at síggja út, sigur Jógvan Martin Olsen*

Mynd: Jens Kr. Vang

Venjingarnar fyrrapartin í dag góvu ikki tær stóru ábendingarnar um, hvussu liðið fer at síggja út, sum skal á vøllin leygardagin. Landsliðið vandi innlegg og hevði eisini skotvenjingar, og endaðu við einum dysti, har leikararnir vóru ógvuliga fokuseraðir og spældu við nógvari ferð.

Liðini sum spældu høvdu níggju mans hvør, og so vardu Meinhard og Jákup hvør sítt mál. Liðið í vestum var mannað við Jákup, Atla, Vagnur og Janus í verjuni. Tað kundi sæð út sum eitt boð upp á verjuna leygardagin, men samstundis spældi Fróði Benjaminsen í miðverjuni hjá mótpartinum, so tað kundi sæð út sum, at landsliðsvenjarin umhugsar møguleikan at seta Fróða í miðverjuna.

**Stuðlið liðnum**

Landsliðsvenjarin kundi tó ikki siga, hvussu liðið fer at síggja út leygardagin.

– Vit hava sama útgangsstøði til dystin leygardagin, sum vit hava til hvønn dyst, og tað er at fáa eitt so gott úrslit sum gjørligt, sigur Jógvan Martin Olsen.

– Men tað er givið, at vit mugu vera meiri dugnaligir í verjupartinum enn undanfarnu dystir, sigur landsliðsvenjarin, sum samstundis leggur dent á, at tað ikki merkir, at teir fara at stilla 10 mans rundan um egnan brotsteig at verja.

Spurdur um, hvønn leiklut hann ætlar Mikkjal Thomasssen skal hava, sigur Jógvan Martin Olsen, at har er onki avgjørt.

– Vit hava eina venjing aftrat í morgin og tá skulu tveir leikarar sáldast frá, so eg fái ikki sagt nakað um tað, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sum eisini hevði eina áheitan fyri føroysku viðhaldsfólkini.

– Stórtapini níva ikki einans hjá viðhaldsfólkunum, men eisini hjá okkum í hópinum. Tí hava verður tað mín áheitan til viðhaldsfólkini, um at stuðla liðnum, tá tað fer á vøllin leygardagin.å

# 6 heiðursmerkir í Rom

**Føroyingarnir í Rom hava fingið nøkur fantastiska góð úrslit. Øll sum ein hava tey sett persónligt mett, og hava tey vunnið seks heiðursmerki – tríggjar gull, tvør silvur og eina bronsu**

SPECIAL OLYMPICS
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Special Olympics í Rom er av og Føroyar hava fingið nøkur framúr góð úrslit. Ikki færri enn seks heiðursmerki eru komin í hús, og tí kunnu luttakararnir við góða samvitsku njóta endahátíðina, sum verður í kvøld.

**3 gullmedaljur**

Apolonia var heiðursmerkjaslúkurin í føroyska hópinum. Í svimjing vann hon gull í 50 metur firvald og 50 metur bringu, umframt at hon eisini vann silvur saman við Ragnvaldi í stafettini.

Ragnvaldur sjálvur vann eisini gull í 200 metur frísvimjing, og eina silvurmedalju ognaði hann sær eisini í 100 metur bringu.

Bronsumedaljuna fekk Kristian Martin í kúlukasti. Hann varð annars diskvalifiseraður, men henda avgerð varð tikin upp til viðgerðar og vísti tað seg, at vera ein skeiv avgerð, og tí var Kristian Martin við aftur í kappingini.

Tað fegnaðust tey í føroyska hópinum um, og Kristian Martin kvitteraði við at skaffa føroyska hópinum eina bronsumedalju, soleiðis at liðið sleppur heim við metalli av øllum slag.

## Heini í sjónvarpinum

Elite 3000 Helsingør, sum er liðið hjá føroyska landsliðsleikaranum í hondbólti, Heini Hanusarson, skal spæla beinleiðis á sjónvarpsrásini 3+ í annaðkvøld kl. 18.00. Dysturin er ímóti TVIS/Holstebro, sum liggur á einum 10. plássi við tveimum stigum fyri fýra dystir. Liðið hjá Heini liggur á næstaftasta plássi við einum stigi, men um teir vinna dystin ímóti TVIS/Holstebro, so fer Elite 3000 Helsingør framvið TVIS/Holstebro.

**-teitur**

---

## Agger besti leikarin í september

Danin Daniel Agger hevur av álvara fingið fótin fyri seg í Liverpool. Liðfelagarnir, viðhaldsfólk og fjølmiðlarnir rósa honum fyri hansara sannførandi avrik í miðverjuni hjá enska stórfelagnum.

Nú fær danin so enn eitt herðaklapp. Professional Footballer's Association hevur kosið hann at vera besta leikaran í Premier League í september.

Í grundgevingunum verður skemtandi sagt, at Daniel Agger livir upp til søgurnar um, at hann er besta útflutningsvøran hjá Danmark síðani Carlsberg-øl.

Og fyrrverandi Liverpool leikarin, Torben Piechnik, er heldur ikki seinur at rósa Agger. Við givemefootball.com sigur hann, at ongin ivi er um, at Daniel Agger er ein av mest lovandi leikarunum í Danmark í fleiri ár.

**-rwd**